ítróttur

Nr. 168 • leygardagur • 1. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Landsliðið er glottin hjá Jákupi




*– Sjálvandi er tað keðiligt. Tá tú hevur spælt á hægsta støði í einum landi í fleiri ár, so er tað einki hugaligt at fara einsamallur til eitt nýtt land og so at sita á beinkinum, sigur føroyski landsliðsmálverjin*

**Á landsliðnum er hann fyrsta valið, meðan Jákup Mikkelsen er settur á beinkin í Molde, har tíðin nú av álvara fer at ganga undan**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Tað er eingin ivi um, at Jákup Mikkelsen í kvøld fer at verja føroyska málið. Hann stóð seg sera væl í Jugoslavia, og tí er Allan Simonsen, sum plagar at halda seg til tað, sum hann er vanur, neyvan í iva um, at sami maður, sum stóð millum stólparnar í Beograd, aftur hesa ferð skal fáa møguleikan.

Men síðani hann kom aftur til Molde frá landsliðsferðini í Jugoslavia, hevur Jákup Mikkelsen ikki kent nakað sum helst til, at venjarin í felagnum hevur skattað, at Jákup hevði spælt væl í landsdystinum:

– Eg hevði ikki hugsað um tað, at eg skuldi á beinkin, og eg hevði einki fingið at vita. Tað var ikki fyrr enn á taktikfundinum tann sunnudagin, at venjarin segði, at talan fór at vera um sama lið sum síðst, men at Knut skuldi verja málið, greiðir Jákup Mikkelsen frá.

Síðani tá hevur Molde spælt tveir landskappingardystir, og Jákup hevur sitið á beinkinum báðu ferðirnar.

– Sjálvandi er tað keðiligt. Tá tú hevur spælt á hægsta støði í einum landi í fleiri ár, so er tað einki hugaligt at fara einsamallur til eitt nýtt land og so at sita á beinkinum. Eg havi glett meg so nógv at koma heim til landsdystirnar hesa ferð, sum eg kanska ongantíð áður havi gjørt, ásannar Jákup Mikkelsen, og tað er ikki so torført at fylgja honum.

Men ert tú so væl fyri at spæla landsdyst nú, sum tú vart, tá landsliðið var í Jugoslavia?

– Tað haldi eg avgjørt. Men – um eg sleppi upp í part – so rokni eg ikki við, at tað fer at verða so nógv at gera hesa ferð, sum tað var í Beograd. Í tí sambandinum havi eg hug at leggja afturat, at tað er ein sonn fragd at standa aftanfyri ta verjuna, sum vit høvdu í Beograd. Okkara verjuspælarar vóru framúr væl skipaðir, og tað var stuttligt at síggja, hvussu væl teir stóðu seg í nærdystunum – bæði á jørðini og í luftini, vísir Jákup Mikkelsen á.

## Lítil áhugi

Í Noregi er skipanin tann, at flestu landskappingardystirnir í bestu deildini verða spældir sunnudagar. Næstbesta liðið hjá Molde spælir í einum bólki í tí, sum teir kalla 2. deild. Tvær tær seinastu ferðirnar hevur Jákup spælt dystir mánakvøld. Fyrru ferðina var úrslitið 3–0, og seinnu ferðina 3–3.

Sambært frásøgn í lokalu heimasíðunum, so stóð Jákup seg serliga væl í tí fyrra dystinum. Hann varð spældur dagin eftir, at Jákup hevði fingið boðini um, at nú skuldi hann út á beinkin at sita.

Tað eru fáir áskoðarar til 2. liðs dystirnar, og tað er sjálvandi alstórur munur á at spæla á landsliðnum og so at spæla 2. liðs fótbólt í Noregi.

## Tíðin gongur undan

Tá Jákup Mikkelsen gjørdi avtalu við Molde, so vóru hann og felagið samd í, at í fyrstu atløgu skuldi sáttmálin vera galdandi fyri tað, sum var eftir av hesum kappingarárinum. Síðani skuldi støða takast til, um nýggjur sáttmáli skuldi skrivast.

–Tíðin er ikki so long. Tað eru sjey umfør eftir av landskappingini, og so leingi sum venjarin tekur ein annan málverja framum á besta liðnum, so eru eingir møguleikar hjá mær at vísa nakað, ásannar Jákup Mikkelsen.

Konan og tey bæði børnini eru í Danmark, og um einki annað spyrst burturúr, so fer Jákup aftur til Danmarkar í heyst. Hvussu tað so verður við fótbólts framtíðini ber ikki til at siga nakað um í løtuni.

## Nógvir útlendingar

62 útlendingar eru á lønarlistanum hjá feløgunum, sum eru umboðað í bestu norsku fótbóltsdeildini. Fimtan av teimum komu í norskan fótbólt í summar, og Jákup Mikkelsen er ein av teimum.

Sambært norska blaðnum VG, so hava tveir av hesum ikki enn fingið møguleikan at spæla á besta liðnum.

Molde telist millum feløgini, sum í summar hava fingið flestar útlendskar spælarar. Umframt Jákup Mikkelsen eru tveir aðrir útlendingar komnir til Molde.

VG hevur bitið merki í, at tað felagið, sum hevur fægstar útlendskar spælarar, er Rosenborg. Teir hava bara tveir útlendingar á lønarlistanum, og teir eru ovast á støðutalvuni. Lillestrøm, sum stríðist við Rosenborg um NM, hevur sjey útlendskar spælarar í hópinum. Talan er fyri tað mesta um spælarar, sum teir hava keypt fyri lítið av pengum. Um tað gongst spælarunum væl, so er møguleiki at selja teir víðari og harvið at vinna pengar upp á teir.

# Heðin heldur seg til

**Skjóti B36 maðurin ásannar, at møguleikin hjá honum er størri, enn hann er, tá Øssur Hansen er við**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Enn hevur Heðin á Lakjuni ongantíð verið á landsliðnum frá fyrsta bríksli. Um hann verður tað hesa ferð, var einki sagt um, tá landsliðið í gjár legði síðstu hondina á fyrireikingarnar til dystin ímóti Luksemborg seinna partin í dag. Men Heðin á Lakjuni er samdur í, at møguleikin hjá honum eigur at vera størri, nú Øssur Hansen ikki er tøkur, enn hann er, tá Øssur er tøkur:

– Øssur er ein góður og royndur spælari, og hann er sjálvskrivaður á plássinum í vinstru. At hann ikki er við hesa ferð ger, at møguleikin hjá øðrum er størri at koma á liðið. Tað havi eg hugsað. Tað er venjarin, sum setur liðið, men eg skal ikki dylja, at tað hevði verið ein góð kensla hjá mær, um hann hevði gjørt av, at eg skuldi fáa møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu. Tað havi eg ongantíð áður havt, sigur Heðin á Lakjuni.

B36 maðurin hevur ikki nervar:

*– Tað hevur gingið væl í B36 í ár, og vit hava allir stórt sjálvsálit, heldur Heðin, sum fleiri ferðir í ár hevur spælt á plássinum, sum nú skal mannast í dystinum ímóti Luksemborg.*

*– Tá eg havi verið longri frammi á vøllinum, so hevur Jens Kristian Hansen ofta verið vongspælari á miðvøllinum í vinstru. Tað er sjálvandi góður møguleiki fyri, at hann fer at spæla í plássinum, sum Øssur Hansen plagar at spæla í. Um so verður, so má eg bara vera klárur at gera mítt besta og so vóna, at venjarin fer at geva mær møguleikan.*




*Heðin á Lakjuni bíðar spentur, nú Allan Simonsen skal finna sær ein nýggjan vongverja í vinstru*



# Julian spælir næstan annan hvønn dag

**Landsliðsferðin til Føroya kennist næstan sum frítíð aftur ímóti skránni, sum teir í Hull hava í hesum døgum**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Í fyrrakvøldið komu síðstu útisetarnir í landsliðsleguna. Ætlanin var, at seinna venjingin hósdagin skuldi vera klokkan 17.30. Tá tað seinnapartin var greitt, at teir tríggir, sum orsaka av plásstroti í flogfarinum ikki vóru komnir úr Danmark, ikki fóru at vera á Toftum fyrrenn um útvarpstíð, varð venjingin útsett til klokkan 19.15. Tá var landsliðið fullmannað.

Millum síðstu spælararnar á Svangaskarði var Julian Johnsson. Hetta er fyrsta ferðin, at hann er heima á klettunum í landsliðsørindum, síðani hann flutti úr Sogndal og til Hull. Hóast hann flutti úr bestu norsku deildini og í fjórðu bestu eingilsku deildina, so er Julian fegin um, at hann fór:

*– Fyri meg sum persón, og eisini lønarliga og ítróttarliga hevur flytingin verið góð. Tað er spennandi at royna at búgva í Onglandi, tað eru meiri pengar í eingilskum fótbólti, enn tað eru í norskum fótbólti, og tað er spennandi at vera við í stórari kapping um plássini á liðnum og fleiri ferðir um vikuna at spæla frammanfyri nógvum áskoðarum.*

Týskvøldið spældi Hull landskappingardyst á heimavølli ímóti Kidderminster. Tað vóru 8.835 áskoðarar, og talan var um rættuligt drama. Tá tað restaðu tíggju minuttir varð ein av Hull spælarunum rikin av vølllinum. Tá sá út til, at tað skuldi enda 1–1, men í yvirtíðini skoraði Hull sigursmálið. Aftur hesa ferð spældi Julian Johnsson alla tíðina, og á heimasíðuni hjá Hull verður hann róstur fyri gott innlegg og fyri at hava verið við til at leggja nógv fyri í verjupartinum, tá tað stóð á.

12. september skal Hull spæla í lítlu steypakappingini, Worthington Cup, á útivølli ímóti Derby úr bestu deildini.

Tað verður ein orduligur sýnisgluggi hjá tær?

*– So langt havi eg ikki hugsað. Eg trívist væl, har eg eri. Vit spæla so nógvar dystir nú, at eg taki bara ein dag og ein dyst í senn. Trýstið er stórt, og tí er tað hugaligt at vera komin til Føroya at vera saman við liðfeløgunum í eina lítla viku, heldur Julian Johnsson.*

## Javnvágin

26 ára gamli Julian Johnsson er ein av veteranunum á landsliðnum. Hann hevur verið fastur maður á liðnum seinastu seks árini. Einasta landsliðsmálið í 41 dystum skoraði hann í næsta dystinum, hann var á liðnum. Tað var tá Føroyar 25. mai í 1995 vunnu 3–0 á San Marino á Svangaskarði. Ta ferðina staðfesti Julian í 62. minutti við rimmar langskoti 3–0 sigurin. Hini bæði málini høvdu Jens Kristian Hansen og Jens Erik Rasmussen longu skorað í 6. og 8. minutti.

*Tað er spennandi at royna at búgva í Onglandi, tað eru meiri pengar í eingilskum fótbólti, enn tað eru í norskum fótbólti, sigur Julian Johnsson*

Tá Føroyar 24. mars vunnu 2–0 í Luksemborg var Julian Johnsson á liðnum, og hann heldur, at møguleiki er fyri, at vit eiga at vinna á teimum eina ferð afturat.

– Men vit skulu ikki leypa á, soleiðis at vit ikki ansa nóg væl eftir í verjupartinum. Tað ræður um at finna javnvágina. Vit skulu vera varnir, so teir hava hug at koma fram á vøllin, men samstundis haldi eg, at vit mugu gera nyttu av, at teir ikki hava betri bóltleika og ikki eru skjótari enn, at vit hava møguleika at leggja trýst á teir frammi á vøllinum, heldur Julian Johnsson, sum altíð hevur verið stóri arbeiðsmaðurin á miðvøllinum. Um tað ber til, so tykist hann í løtuni at vera uppaftur betri fyri, enn hann hevur verið.



# Landsliðsdagur

**Ikki færri enn 21 landsdystir verða leiktir kring Europa leygardagin**

HM-DYSTIR
*Jákup Mørk*

Umframt dystin millum Føroyar og Luksemburg, sum verður á Svangaskarði, skulu hópin av dystum avgreiðast leygardagin.

Europeiska fótbóltssamgongan, UEFA, ásetur vanliga fastar leikdagar, so lættari er at samskipað leikdagarnar í ymsu europeisku deildunum.

Umframt dystin í Føroyum, eru tveir aðrir dystir á skránni í okkara bólki. Russland ferðast til Slovenia, har teir kunnu at kalla staðfesta luttøku sína, meðan Sveis og Jugoslavia fara á vøllin at dystast um næst fremsta plássið í bólkinum, sum kann geva atgongd til endaspælið í Japan og Suðurkorea.

## Grannarnir

Grannar okkara í Norðanlondum skulu allir í dyst, og í fleiri førum tykist talan verða um dystir, sum hava alstóran týdning fyri HM-vónirnar hjá hesum.

Danmark er á odda í sínum bólki, og hendan sessin halda teir fast um, um talan verður um heimasigur ímóti Norðurírlandi. Danir munnu tó skeita eins nógv móti Íslandi, sum teir gera eftir dystinum í Parkini, tí um Ísland megnar at taka stig frá Kekkia á heimavølli, kann hetta meira ella minni tryggja dønum fremsta sessin.

Í bólki fýra hevur higar til gingið framúr væl hjá Svøríki, og eru teir í løtuni á fremsta sessinum í bólkinum. Nærmasti kappingarneytin er Turkaland, og leygardagurin kann vísa seg at hava avgerandi týdning fyri støðuna í hesum bólkinum. Hjá báðum pørtum er talan um lúmskar útidystir, har Svøríki ferðast til Makedonia, meðan Turkaland skal royna seg ímóti Slovakia.

Noreg hevur seinni árini helst verið sterkasta norðurlendska umboðið í Europa, men í inniverandi undankapping er korthúsið at kalla rapað. Noreg hevur staðið seg stak illa, og einamest ræður nú um hjá teimum at vaska æruna, tá teir hava møguleika at vinna oddaliðnum í bólki 5, Pólandi, eina neisu í Warshava.

Seinasti av dystunum hjá grannum okkara er tann hjá Finnlandi á útivølli móti Albania. Hóast talan her er um eina grannatjóð, so er lítil ivi um, at føroysk fótbóltseygu í stóran mun venda áhugan móti hinum dystinum í bólki níggju. Her skulu Týskland og Ongland nevnliga hittast á Olympiska leikvøllinum í München, og eftir øllum at døma verður hetta dysturin, sum ger av, hvat av hesum báðum fótbóltsstórveldum vinnur fremsta plássið í bólkinum.

# Bossurin verður venjari

**Triði venjarin hjá Toda og teimum verður Niels Christian Holmstrøm, sum fyri næstan einari fjórðingsøld síðani varð kosin ársins venjari í Danmark**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Todi Jónsson gongur í hesum døgum í Keypmannahavn, har hann vónar, at hvíld frá dystum og miðvís venjing skulu bera við sær, at hann verður hundrað prosent klárur, tá tað um eina viku aftur verður farið undir donsku landskappingina, og tá FCK aftur skal spæla í Europa Cup.

Einki er at ivast í, at Todi fylgir væl við, hvussu tað gongst hjá landsliðnum. Men hesar hugsanirnar hava í vikuni verið órógvaðar av, at nú hevur FCK aftur verið forsíðutilfar í miðlunum. Eitt er at Heine Fernandez sigur seg harmast, at hann tók so rívan til, tá hann ikki slapp at spæla ímóti Lazio. Tað er farið longri aftur í miðlunum.

Stóra søgan síðstu dagarnar hevur verið, at FCK venjarin tveir teir síðstu mánaðirnar, sviin Kent Karlsson, hevur lagt frá sær.Á tíðindafundi hósdagin segði hann seg ikki vera føran fyri at ganga fullkomuliga upp í uppgávuna, soleiðis sum hann hevur gjørt áður, og soleiðis sum hann segði, at tað er neyðugt at gera.

Nýggjur venjari í FCK er Niels Christian Holmstrøm, sum er ítróttarstjóri í felagnum. Hann skal hava leiðsluna, meðan hann og Flemming Østergaard leita eftir einum nýggjum venjara.

Holstrøm er ikki ókendur við venjarastarvið. Upprunaliga spældi hann við KB, har hann var vandamikil miðframherji og í 1974 varð kosin ársins spælari. Í áttati árunum var hann venjari fyrst í B 1903 og so í KB. Tað eru hesi bæði feløgini, sum eru grundarlagið undir FCK.

Eftir at Holmstrøm gavst sum venjari var hann í mong ár í starvi hjá Team Danmark. Nú hevur hann eitt skifti verið ítróttarligur stjóri í FCK, og nú hevur hann – fyribils í hvussu so er – fingið ein kaskett afturat.

Hjá Toda Jónsson fer venjaraskiftið neyvan at hava nakrar broytingar við sær. Ta Todi er tøkur, er hann upplagt val til annað álopsplássið hjá FCK – uttan mun til hvør hevur venjaraábyrgdina.